átrúnaður

Lagt til rættis: Snorri Brend snorri@sosialurin.fo



orðið



*Hesa vikuna:*

**John S. Myllhamar**

## Fyri ringum tíðindum ikki hann ræðist

*Sálmur 112. 7*

Frá morgni til myrkurs proppa fjølmiðlarnir okkum við ringum tíðindum, og menniskjan ørmaktast og fellur í ráðaloysi fyri tí, ið koma man.

Hin guðleysi hevur eisini alla orsøk at óttast tey ringu tíðindini. Tann, ið bara livir fyri pengum, óttast at bankin skal fara á húsagang og hann missir alt, ið hann hevur lagt niður fyri. Tann, ið hevur framt illgerðir, hevur alla orsøk at óttast tey ringu tíðindi, at fortíðin skal innheinta hann ein dag. Tann, ið liggur á sjúkrahúsi, óttast tey ringu tíðindini, ið siga, at hetta er byrjanin til endan: sjúkan er krabbamein ella blóðtøppur. Tín dári, í hesi nátt verður sál tín heintað av tær, tað eru seinastu tíðindini her á foldum fyri eitt guðleyst menniskja.

Undir øllum umstøðum má tað natúrliga menniskja óttast tann dag, tá ið tey ringu tíðindini koma og taka burtur alla trygd og eydnu. Tí eru tað eisini mong, ið óttast fyri teimum ringu tíðindunum, sum brádliga kunnu koma.

Livir eitt menniskja uttan Guð og uttan vón í heiminum, er grund at óttast, tí tá stendur ein verjuleysur, tá ið forlagstungi dagurin kemur. Men hevur eitt menniskja tikið móti teimum góðu tíðindunum, tí gleðiliga boðskapinum, at syndin er strikað, at dómarin er vorðin frelsari, og at tey kunnu vænta sær alt gott frá honum, tá hava tey ikki orsøk at óttast tey ringu tíðindini. Ikki so at skilja, at Guðs børn vera spard fyri ring tíðindi; vit skulu øll hoyra mong av teimum. Men okkum nýtist ikki at ræðast tey, tí Guðs kærleikstankar liggja aftanfyri tey.

Guð gevur megi at bera tey, tí eydnan hvílir á tí trygga grundvølli, sum heimsins nos ikki kunnu vika.

# Vilja røkka inneftir og úteftir

**- Framgongdin í ungdómsarbeiðinum er ikki tengd at einum persóni, men at øllum teimum sum eru við, siga Senøva og Dánjal Petersen**

**Hoyvík:** Hjúnini Senøva og Dánjal Petersen tóku herfyri við sum leiðarar av ungdómsarbeiðinum í samkomuni Lívdini.

- Vit eru sera glað fyri hesa uppgávuna, ið vit hava fingið, og fyri tey ungu, ið longu eru virkin í arbeiðinum, siga tey bæði.

Teirra visjónir fyri arbeiðið eru í høvuðsheitum í tveimum:

Í fyrra lagi, vilja tey reka ungdómsarbeiðið við tí endamáli at røkka bæði inneftir og úteftir.

Men, staðfesta tey: - Meðan vit royna at fáa nýggj fólk at koma til ungdómsmøtini, mugu vit endiliga ikki gloyma tey, ið longu eru trúføst.

- Fyrst mugu vit arbeiða upp á "infrastrukturin", og síðani verður hugt meira úteftir!

Senøva er úr Sandavági. Hon hevur gingið á bibliuskúlanum hjá GLO í Motherwell í Skotlandi. Dánjal er úr Havn.

Fyri einum ári síðan varð hann fyrsti føroyingur nakrantíð, sum tók eitt BA Honours prógv í gudfrøði frá Birmingham Christian College í Onglandi.

Senøva og Dánjal giftust í fjør og búgva í Sandavági.



*- Vit mugu ikki gloyma tey trúføstu í ungdómsarbeiðinum, siga nýggju ungdómsleiðararnir í Lívdini, Senøva og Dánjal Petersen*

# Fáa íblástur til hjúnalagið

**Undir heitinum »Ger nakað gott fyri parlagið« skipar samkoman Keldan fyri einum venjingarskeiði fyri pør í heyst. Endamálið er at geva hjúnunum øktan førleika at loysa møguligar trupulleikar.**

**Skálabotnur:** Slík skeið hava verið vanlig í grannalondum okkara, men nú verður so á fyrsta sinni møguleiki fyri hesum í Føroyum.

Talan er um eitt sonevnt PREP-skeið sum á føroyskum leysliga kann umsetast til »Praktisk Reiðskap til eitt Enn betri Parlag«

Keldan skipar nevniliga fyri einum slíkum skeiði í september mánaði, og er ætlað hjúnum sum vilja arbeiða við parlagi sínum.

Í skeiðnum verður dentur lagdur á samskifti millum mann og kvinnu, eins og dentur verður lagdur á at geva teimum íblástur til alt tað sum fer fram í einum hjúnalagi.

- Hagtølini vísa, at ein sløk helvt av øllum giftum pørum fara frá hvørjum øðrum. Hinvegin vísa kanningar, at færri pør skiljast eftir at tey hava verið á hesum skeiðnum, verður sagt úr Kelduni.

Undirvísingin fer fram við framløgum og venjingum í samskifti. Undirvíst verður í felagi, meðan pørini venja seg hvør sær við einum vegleiðara.

Skeiðini verða tvey vikuskifti í september og verða hildin í samkomubygninginum í Skálabotni.

## Ynskja at keypa eina fólkakirkju

**Danmark:** Í minsta lagi 10 útlendskar samkomur eru til reiðar at keypa ella leiga kirkjur ið eru í vandi fyri at verða afturlatnar.

Í roynd og veru standa tær í kø fyri at halda fram við teirri kristnu tradisjónini í hesum kirkjunum.

- Tað hevði verið eitt satt bønarsvar, um vit kundu keypt ella leiga eina fólkakirkju, sigur pastorurin, Tony Acheampong úr First International Baptist Church.

Kirkja hansara er økt úr ongum upp í 200 limir síðani 1999, og vøksturin heldur á alla tíðina. Trupulleikin er bert hann, at tey hava ongan bygning til samkomuna.

Møguleikin fyri at ogna sær eina fólkakirkju er íkomin, eftir at Københavns Stiftsudvalg og biskuppurin, Erik Norman Svendsen hava víst á 10 fólkakirkjur, sum eru í uppskoti at lata aftur í framtíðini.

Fleiri hava víst á, at tær útlendsku samkomurnar gera eitt stórt arbeiði við integrering í Danmark, og eru avgjørt við til at geva íblástur og harvið ríka danskt kirkjulív.

Í heyst verður avgjørt, hvussu verður við hesum 10 kirkjunum. Lítil ivi er um, at mong vera um boðið um avgjørt verður at lata tær aftur og lata tær til onnur at brúka.

## Profetisk stevna í Filadelfia

**Havn:** Í oktober mánaði fær samkoman Filadelfia í Havn vitjan av Larry Randolph úr USA. Í hesum sambandi verður skipað fyri eini profetiskari stevnu í Filadelfia. Larry Randolph kemur frá familju við fleiri prædikufólkum, og byrjaði hann sína egnu tænastu, tá ið hann var fimm ára gamal. Tá ið hann var 21 ára gamal, hevði hann eitt livandi møti við Heilaga Andan, sum leiddi hann inn í eina heimsumfatandi profetiska tænastu. Tann sterka profetiska gávan hjá Larry, saman við einum praktiskum og skemtiligum undirvísingarstíli, hevur givið mongum eina nýggja mynd av teirra lívsleið. Larry hevur eitt hjarta fyri tí komandi ættarliðinum, og hann eggjar hesum ættarliði at koma til eitt djúpari og inniligari lív við Kristusi. Larry hevur verið sera virkin í fleiri vekingum síðani sekstiárini, og hevur skrivað ta viðurkendu bókina "Brukervennlig profetisk tjeneste".